**Nr. 88/2014**

**Reimund Langgaard**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um Leirvíkstunnilin, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í undirstøðukervismálum (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvussu nógv akfør koyra árliga ígjøgnum Leirvíkartunnilin?
2. Í hvussu nógvum av stóru tunlunum hoyrist útvarp ikki?
3. Hvussu nógv kostar tað at fáa útvarp í Leirvíkartunnilin?
4. Er landsstýrismaðurin samdur við spyrjaranum um, at tað betrar um ferðslutrygdina, um útvarp hoyrist í tunlinum?
5. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at fáa útvarp í tunnilin, og í so fall, nær kann væntast, at hetta verður liðugt?

**Viðmerkingar**
Í vikuni bar P/F Norðoyatunnilin tíðindini, at nú bar til at hoyra allar útvarpsrásirnar í Norðoyatunlinum – eisini t.d. KissFM og Voxpop – og er hetta kanska ikki meir enn rímiligt í 2015.

Tað undrar kortini stórliga, at tað enn ikki ber til at hoyra Útvarp Føroya í granna-tunlinum, sum enntá hevur nógv meira ferðslu enn Norðoyatunnilin.

Spyrjarin er eisini av tí áskoðan, at radiosignal kann betra um trygdina, bæði tí at hetta kann brúkast til samskifti, um ein vanlukka skuldi hent í tunlinum, og tí at vantandi útvarp kann hava við sær, at akfør koyra óneyðuga skjótt fyri at náa at hoyra t.d. tíðindini.

**Á Løgtingi, 29. apríl 2015**

Reimund Langgaard